# Halda skeið at styrkja fakfeløgini kring landið

**– Føroya Arbeiðarafelag leggur stóra órku í at styrkja fakfeløgini kring landið. Ein tátttur í hesum er at halda reglulig skeið fyri fakfelagsfólki**

FAKFELAGSPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*



*Aftur hesa vikuna er skeið í Føroya Arbeiðarafelag fyri álitisfólkum hjá Føroya Arbeiðarafelag kring landið. Tað er neyðugt at útbúgva fakfelagsfólk so væl sum gjørligt, tí vitan er vápn, sigur Ingeborg Vinther*

– Vitan er vápn!

Skal nakar veruligur dugur vera í fakfelagsarbeiðnum, er tað ein avgjørd fyritreyt, at fakfelagsfólk eru so væl útbúgvin í fakfelagsarbeiði sum gjørligt.

Tað hevur Føroya Arbeiðarafelag ásannað og tí ger felagið eisini rættiliga nógv burturúr at halda skeið fyri fakfelagsfólki.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at tey hava skeið at kalla hvønn mánað fyri teimum, sum standa á odda fyri lokalfeløgunum hjá Føroya Arbeiðarafelag kring landið.

Føroya Arbeiðarafelag er spjatt um alt landið og tí er virksemið hjá felagnum í stóran mund tengd at arbeiðnum hjá lokalfeløgunum og tí hevuyr tað alstóran týdning, at leiðslurnar í hesum feløgunum eru so væl útbúnar í fakfelagspolitikki sum gjørligt, sigur hon.

Eisini hesa vikuna er skeið í hølunum á Føroya Arbeiðarafelag, har fomenn og nevndarlimir í lokalfeløgunum hjá Føroya Arbeiðarafelag kring landið, umframt álitisfólk á arbeiðsplássum eru við, tilsamans 19 fólk. Skeiðini eru eina viku.

Hon sigur, at tað er rættiliga stórur áhugi fyri at koma á skeið. Næsta skeiðið verður í næsta mánað eisini tá er fullteknað.

Undirvísarar eru Jákup Páll Mohr Mortensen, nevndarlimur í Postfelagnum og Páll Nielsen, sakførari hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Ingeborg Vinther sigur, at skeiðini eru um fundarleiðslu, samráðingarteknik, nevndarábyrgd, umframt at farið verður ígjøgnum sáttmálarnar, hvussu ymsar greinar í sáttmálunum skulu tulkast o.s.fr.

Hon sigur, at tað er týðiligt at hesi skeiðini geva úrslit.

– Fólk fáa nógv størri áhuga fyri fakfelagsarbeiðnum og tey verða eisini nógv betri før fyri at loysa trupulleikar, sum stinga seg upp kring landið og tað avlastar eisini høvuðsumsitingina hjá Føroya Arbeiðarafelag, sum so aftur fær stundir at taka sær av øðrum málum.

# Kjølarnir lagdir til tveir nýggjar trolarar

**Trolararnir verða lidnir seint í summar og samstundis fara tríggir av kubatrolarunum úr flotanum**

ENDURNÝGGING
*Áki Bertholdsen*

Einaferð seint í summar fáa eysturoyingar tveir nýggir trolarar.

Tað er Beta í Saltangará, sum letur tveir nýggjar trolarar byggja í Spania.

Arbeitt hevur leingi verið við hesi ætlanini, men nú er tað so komið hartil, at kjølarnir til báðar trolararnir vórðu lagdir fyri nøkrum døgunum síðani.

Trolararnir verða bygdir á skipasmiðju í spanska býnum Vigo og gongst sum ætlað, verða teir lætnir eigarunum í august ella september í ár.

Olaf Olsen, stjóri í Beta, vil enn ikki nevna, hvat teir báðir trolararnir kosta at byggja.

Reiðarin sigur, at talan er um tveir trolarar á somu stødd sum kubatrolararnir og ætlanin er, at teir báðir skulu samtrola.

– Samstundis sum hesir báðir trolaranir koma, fara tríggir kubatrolarar úr flotanum, men hvørjir teir tríggir verða, er støða ikki tikin til enn, sigur hann.

### Seks fyri átta

Annars hevur nógv verið tosað um, at tað er so lítið avkast í fiskiflotanum, at tað hevur ikki verið hugsingur um at endurnýggja flotan við nýggjum skipum.

Men Olaf Olsen sigur, at sjálvandi høvdu teir ikki gjørt uttan uttan at teir væntaðu, at tað fór at bera til og framrokningarnar og metingarnar síggja eitt sindur frægari út nú, enn tær hava gjørt og hartil kemur, at bátarnir eru munandi bíligari at byggja í Spania enn tað hevði verið at bygt teir her um leiðir.

Tó viðgongur hann, at tað nú tykist tað aftur sum prísurin á upsa bara fellur og tað hevur alstóra ávirkan á raksturin hjá kubatrolarunum, tí eini 80% av tí, teir fiska, er upsi.

– Prísurin á øðrum fiski er rættiliga nógv uppfarin, men upsin fylgir ikki við, heldur tvørturímóti, so tað er ikki serliga eggjandi, sigur hann.

Um talan verða um at byggja fleiri bátar, veit hann ikki.

– Lat okkum fáa hesar fyrst og síggja, hvussu tað gongur, so kunnu vit taka støðu til restina seinni.

Men tað er onki dulsmál, at kubatrolararnir eru farnir at eldast og treingja til at verða skiftir út. Teir eru bygdir í 1970 í Rosslau í Eysturtýsklandi sum var og hava verið í drift í Føroyum síðani 1978, so hóast allar maskinar, spøl og annað var nýtt tá, er kortini talan um gomul skip.



*Seint í summar fáa eysturoyingar tveir nýggjar trolarar og samstundis fara tríggir kubatrolarar úr flotanum. Kubatrolararnir eru farnir at eldast og Olaf Olsen, reiðari, vónar at fáa allar skiftar út*

Olaf Olsen sigur, at gongur tað væl við hesum báðum trolarunum, vónar hann at tað ber til at fara víðari at endurnýggja trolaraflotan hjá reiðaríðnum.

Hann sigur, at málið hjá teimum er at fáa seks nýggjar trolarar fyri teir átta, sum teir hava, men tað veldst alt um, hvussu tað fer at roynast við hesum báðum, sum nú eru í gerð.

# Sambandsfólk í Suðuroy til reiðar

**– Fyrsti listin til løgtingsvalið er nú klárur. Tað er listin hjá Sambandsflokkinum í Suðuroy**

UPPSTILLING
*Áki Bertholdsen*

Kring alt landið arbeiða politisku feløgini av kraft fyri at gera listar til Løgtingsvalið, sum verður í vár. Mánakvøldið gjørdi sambandsflokkurin í Suðuroy sín lista lidnan og eftir tí, vit vita, er hetta tann fyrsti listin, sum er liðugur. Hjá sambandsflokkinum í Suðuroy er nøkur nýggj andlit, men nøkur hava stillað upp fyrr.Valið hjá sambandsflokkinum verður ikki minst spennandi hesuferð, tí longu í heyst varð tað greitt, at Flemming Mikkelsen, sum hevur umboðað Suðuroynna fyri sambandsflokkin í eitt mannaminni, fór ikki at stilla uppaftur. Flemming Mikkelsen varð valdur á ting í 1987 og sat til 1994, men hevur aftur sitið hetta seinasta valskeiðið frá 1998 til nú.

Somuleiðis er tað greitt, at eitt annað av høvuðsvalevnunum, Jákup Joensen, sum umboðaði flokkin á tingið valskeiðið frá 1994-1998, heldur ikki stillar upp hesuferð.

Hinvegin hevur Johan Dahl játtað at stilla upp og hetta er fyrstu ferð, at hann stillar upp til Løgtingið, ivaleyst eggjaður av tí góða úrslitinum hann hevði á fólkatingsvalinum, har hann fekk 169 pers´ónligar atkvøður.

Eitt annað av fremstu valevnunum hjá Sambandsflokkinum í Suðuroy seinastu ferðirnar, borgarstjórin á Tvøroyri, Finnleif Guttesen er eisini eitt av valevnunum.

Tey, sum stilla upp fyri sambandsflokkin í Suðuroy til løgtingsvalið hesuferð eru:

Zakarias Bech í Porkeri, Svenning Borg í Vági, Johan Dahl í Porkeri, Finnleif Guttesen á Tvøroyri, Marjun Olsen á Tvøroyri, Jaspur Vang á Tvøroyri og Otto West í Hvalba.

Svenning Borg og Jaspur Vang hava ikki stillað upp áður og Marjun Olsen og Johan Dahl hava bara stillað upp til fólkatingsvalið seinast. Hinvegin hava Finnleif Guttesen, Zakarias Bech og Otto West stilla upp áður.

Av teimum, sum stillaður upp seinast, eru Flemming Mikkelsen í Vági, Jákup Joensen í Lopra, Jákup Jacobsen í Fámjin og Randi Jacobsen í Sandvík ikki á listanum hesuferð.

### Nýggjur formaður

Samstundis, sum listin til løgtingsvalið varð gjørdur liðugur, hevði Suðuroyar Sambandsfelag eisini aðalfund. Zakarias Bech, formaður seinastu nógvu árini, tók seg aftur sum formaður og í hansara stað varð Marjun Olsen á Tvøroyri vald. Nevndin í Suðuroyar Sambandsfelag er nú hendan: Marjun Olsen á Tvøroyri er formaður, Sofus Strøm á Tvøroyri er næstformaður, Jens Sivar Djurhuus í Vági er skrivari og Otto West í Hvalba er kassameistari.

Hinir nevnarlimirnir eru Yvonna Magnussen í Vági, Pole Skaalum í Hvalba, Jaspur Magnussen úr Fámjin, Poul Midjord úr Hovi, Hallur Bech úr Porkeri, Andrias Danielsen og Niclas Hentze úr Sumba.



*Flemming Mikkelsen, Løgtingsmaður frá 1978 til 1994 og frá 1998 til nú, vinstrumegin og  Jákup Joensen, løgtingsmaður frá 1994 til 1998, stilla ikki upp aftur fyri sambandið í Suðuroy*



Einar Waag, Føroya Bjór, um broytingar í avgjøldum:

# Arbeiða ímóti føroysku bryggjaríunum

**Einar Waag, stjóri fyri Føroya Bjór, heldur ikki nógv um ætlaðu broytingarnar í avgjøldunum á rúsdrekka.**
**– Vinnumálastýrið tekur við hesum stiginum ein stóran part av grundarlagnum undan okkum, sigur Einar Waag. Ein vín lobby skal hava ávirkað málið nógv**

RÚSDREKKA
*Heri á Rógvi*




*Rùsdrekkamynstrið hjá føroyingum skal eftir broytast, soleiðis at tað verður minni av tí sterkara og nógv meira vín*
*mynd: Jens Kristian Vang*

Hóast einki uppskotið er lagt fyri Løgtingið enn, so hevur tað nú í eina tíð ljóðað, at eitt uppskot er á veg, sum skal broyta avgjøldini á rúsdrekka í Føroyum. Málið hevur flutt seg eitt sindur ímillum Vinnumálastýrið og Fíggjarmálastýrið.

Eftir ætlan skal avgjaldið á sterkaru sløgunum av rúsdrekka hækkast. Hinvegin skal vín og partvíst eisini øl gerast bíligari. Øl við alkoholprosentinum 5,8 (gull øl) fer at kosta tað sama, tí avgjaldið verður óbroytt. Avgjaldið á pilsnara øli við 4,6 % alkoholi verður broytt, soleiðis at hetta ølið verður bíligari. Her er talan um, sambært Einar Waag, eina avgjaldsbroyting upp á 80 oyru fyri hvørja fløsku. Avgjaldið á víni verður so mikið nógv lækkað, at tað væntandi verður  einar 12-14 kr. bíligari  at keypa eina vínfløsku.

Av tí sama kann roknast við, at føroyingar fara at keypa og drekka meira vín enn áður, men hinvegin verður tað dýrari at keypa sær brennvín, soleiðis at færri føroyingar fara njóta tílíkar drykkir.

Í 1992 fingu Føroyar eina rúsdrekkalóg. Fyrsti greinin í hesari lóg er soljóðandi:

§ 1. Endamálið við hesi lóg miðar ímóti at avmarka rúsdrekkanýtsluna og minka sum mest um skaðan, sum rúsdrekkanýtslan hevur við sær fyri einstaklingin og samfelagið, og til tess at røkka hesum endamáli at áseta reglur í sambandi við rúsdrekka í Føroyum.

Tað er sama lóg, sum ásetur, at Rúsdrekkasøla landsins skal setast á stovn og vera einasti innflytarin. Tann førdi politkkurin í Føroyum, sum m.a. Rúsdrekka- og Narkotikaráðið hevur staðið fyri, gongur eisini út upp á, at føroyingar skulu drekka so veikt rúsdrekka sum gjørligt. Og hetta má eisini sigast at ganga tann rætta vegin, nú avgjøldini á teimum sterkaru sløgunum eftir øllum at døma minka.

Hagtøl, sum Sosialurin hevur fingið hendur á, siga, at gongdin seinastu árini hevur verið soleiðis, sum myndugleikararnir hava sett sær fyri. Hóast hesa gongd, so verða tað eftir ætlan framvegis gjørdar broytingar.

### Diskriminera

Ein teirra, sum er alt annað enn fegin um ætlaðu broytingarnar, er Einar Waag, stjóri fyri Føroya Bjór, ið eigur størsta partin av sølnuni av øli í Føroyum.

Í einum skrivi, sum hann og táverandi stjórin fyri Restorffs bryggjarí, Lena Mørk, hava sent Landsstýrinum, verða ætlanirnar viðvíkjandi avgjøldunum harðliga mótmæltar.

Víst verður m.a. á, at avgjøldini á øli ikki fylgja broytingunum á øðrum sløgum, og hetta halda bryggjaríini vera rættiliga órættvíst.

Einar Waag sigur í samrøðu við Sosialin, at talan er um mismun, einki minni.

– Vinnumálastýrið eigur ikki at hava nakað við hetta at gera í fyrstu atløgu, og teir gera mismun á okkum og teimum, ið innflyta vín, sigur Einar Waag.

Hann er ógvuliga keddur um, at øli hjá teimum nú verður ringari stillað yvirfyri víninum.

Einar heldur, at tað vit hava lyndi til at gloyma, at vín jú inniheldur nógv meira alkohol enn øli, sum sambært galdandi lóg ikki kann innihalda meira enn 5,8 prosent. Føroya Bjór hevur fleiri ferðir søkt um at framleiða sterkari øl við atliti at útlendska marknaðinum, men hetta hevur ikki verið politiskur vilji fyri.

### Arbeiða ímóti

Tolið hjá Einari Waag er eftir øllum at døma við at vera uppi.

– Vinnumálastýrið spyr ikki vinnuna eftir. Tað er bert fyribyrgjandi myndugleikararnir, sum sleppa at sina sína hugsan. Tað kenninst sum um, at teir arbeiða ímóti bryggjaríunum í hesum málinum, sigur Einari Waag.

Hann leggur aftur, at hetta fer at kosta hjá teimum.

– Vinnumálastýrið tekur við hesum stiginum ein stóran part av grundarlagnum undan okkum, sigur Einar Waag,  og hann sigur samstundis, at teir selja umleið helvt um helvt gull og pilsnar. Hann væntar, at sølan av gull øli fer at minka munandi, og hetta kann fáa álvarsligar fylgjur. Sambært Einari skal ein Vín lobby vera upp á spæl í hesum málinum. Henda lobby hevur til endamáls at skipa soleiðis, at vín verður bíligari at keypa.



*Nú skulu føroyingar undir at drekka meira vín*
*mynd: Jens Kristian Vang*




*– Vinnumálastýrið tekur við hesum stiginum ein stóran part av grundarlagnum undan okkum, sigur Einar Waag,  og hann sigur samstundis, at teir selja umleið helvt um helvt gull og pilsnar. Hann væntar, at sølan av gull øli fer at minka munandi, og hetta kann fáa álvarsligar fylgjur*
*mynd: Símun á Høvdanum*